# Gott við eigaraskifti



*Tað var mestsum einmælt samtykt, at Pilsnar ølið hjá Restorff er av besta slag*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

ØLSMAKKING
*Ingrid Bjarnastein*

Turid Samró, fyrrverandi eigari av Café Natúr, var eisini og royndi nýggja ølið hjá Restorff í gjár, og helt hon, at tað var heilt vist kappingarført við hitt føroyska ølið á marknaðinum.

– Tað smakkar væl, sigur Turid Samró. – Men sigast má, at seinastu árini hevur Restorff sovið í tímanum, og tí er gott, at bryggjaríið hevur fingið nýggjar kreftir.

Ikki einaferð tey tíggju árini Turid Samró var í Café Natúr, var ein sølumaður frá Restorff og bjóðaði henni at keypa øl frá teimum. Turid sigur, at um ein sølumaður hevði komið á dyrnar, so hevði hon heilt vist umhugsað at selt øl frá Restorff. Turid sigur tó eisini, at hetta nýggja ølið er ógvuliga spennandi, og hetta ger eisini, at tú fert at vænta meira av Restorff.

– Nýggju eigararnir eru knasandi dugnaligir, og teir hava heilt vist ætlanir um at gera Restorff til nakað heilt serligt.

# Nýtt øl frá Restorff

**Fyrrapartin í gjár varð bjóðað til royndarsmakking av nýggja Pilsnar ølinum hjá Restorffs Bryggjarí. Nýggja ølið er at meta sum tað sama, sum tað, ið danir kalla hof øl, og er tað í mesta lagi 4,6% sterkt**



*Síðst í seinasta ári keyptu Óla Svenn Nolsøe og Johan Mortensen meirilutan av partaprøvunum í Restorffs Bryggarí. Nú er nýtt øl komið á marknaðin og var í gjár bjóðað til royndarsmakking av nýggja ølinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

ØLSMAKKING
*Ingrid Bjarnastein*

Pilsnar ølið hjá Restorff er tó ikki spildurnýtt á marknaðinum.

– Fyrsta blandið kom í summar, men so varð tangin tómur, og ikki fyrr enn til jólar er næsta blandið komið, sigur Óla Svenn Nolsøe, sum er nýggjur stjóri á Restorffs Bryggjarí.

Hetta ølið er at tað sama, sum danir kalla hof øl, og er tað bryggja í samstarvi við Carlsberg Laboratoriið í Danmark.

Óla Svenn Nolsøe sigur, at fólk flest siga, at Pilsnar ølið smakkar væl. – Alt øl er eins. Tað vil siga, at tað er alt øl er gjørt úr sama tilfarinum, korn og humle. Spurningurin er bara, hvussu nógv tú letur í av hvørjum, greiðir Óla Svenn Nolsøe frá.

Pilsnar ølið er nú komið fyri at verða, og verða Pilsnar øl og Skansaøl tað, ið verður at fáa frá Restoffs Bryggjarí av øli.

# Búktalari vitjaði barnadeildina

VITJAN
*Ingrid Bjarnastein*

Fyrrapartin í gjár vitjaði búktalarin Absalon Áargarð á barnadeildini á Landssjúkrahúsinum. Við sær hevði hann dukkur og annað, sum hann undirhelt børnunum við. Tiltakinum skipaði Odd Fellow fyri.

– Hetta er eitt av endamálunum hjá Odd Fellow, sigur Petur Seloy yvirmeistari á Amboltinum, sum er Losjan hjá Odd Fellow felagsskapinum.

– At hjálpa har fólk hava tað ringt, og hetta verður so gjørt í tráð við tað. Børnini eru sjúk, og tí hava vit skipað fyri hesum fyri at gera dagin hjá teimum eitt sindur meira spennandi.

Og tað sá út til at eydnast ógvuliga væl. Børnini flentu í kíki, meðan Absalon og fuglur hansara tosaðu og undirhildu. Eisini børnini sluppu upp í part, og tey sóu út til at hava gloymt alt um, at tey vóru sjúk.



*Búktalari vitjaði í gjár á barnadeildini, og børnini sóu út til at hava tað ógvuliga stuttligt*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Jan Christiansen og Bjarni Djurholm:

# Ølið smakkar væl!

**Millum innbodnu gestirnar á Restorff Bryggjarí fyrrapartin í gjár, vóru Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum og Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn. Teir báðir vóru samdir um, at nýggja Pilsnar ølið hjá Restorff var av besta slagi**

ØLSMAKKING
*Ingrid Bjarnastein*



*Bjarni Djurholm og Jan Christiansen vóru samdir um, at nýggja Pilsnar ølið hjá Restorff smakkaði væl*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Jú, nýggja ølið smakkar væl, sigur Bjarni Djurholm. Bjarni Djurholm hevur seinastu dagarnar verið settur í samband við uppskot, sum liggur úti í fíggjarmálastýrinum, um at lækka avgjaldið á øli og víni.

– Hetta er eitt tilmæli sum rúsdrekkasølan av fyrstan tíð er komin við, sum síðani hevur verið til eina eftirmeting hjá Rúsdrekka og Narkotikaráðnum, greiðir Bjarni Djurholm frá. – Endamálið er at samlaða alkoholnýtlan skal ikki vaksa, men at fólk skulu fara yvir at drekka veikari sløg. Talan er um at taka broddin av tí sterku alkoholnýtsluni í Føroyum, har Føroyar liggja væl omanfyri onnur lond í tølum. Tað er at fyritrekkja, kanska serliga frá einum heilsusligum sjónarmiði, at fólk fara at drekka tey veikaru sløgini av brennivíni, men sjálvandi við tí fyri eyga, at samlaða alkoholnýtslan ikki økist.

Alkoholnýtslan í Føroyum hevur staðið mestsum í stað í 10 ár, og nú er tíðin so komin at endurskoða hetta, og soleiðis skila avgjaldið eftir nýtsluni.

Spurdur um vit møguliga fara at síggja øl og vín, og kanska enntá sterkari rúsdrekka í handlunum í Føroyum, sigur Bjarni Djurholm, at tað verður ikki í næstu framtíð.

## Restorff og borgarstjórin grannar

Eisini borgarstjóranum Jan Christiansen dámdi væl nýggja Pilsnar ølið.

– Nú havi eg ongantíð drukkið øl klokkan níggju ein týsmorgun fyrr, men eg má siga, at hetta gagnaðist mær merkiliga væl, sigur ein flennandi Jan Christiansen.

– So tað er bara at ynskja, at sølan fer at ganga væl, og eg eri glaður og stoltur yvir, at kunna lýsa fyri Restorff. Bryggaríið hevur verið mín nærmasti granni í 25 ár, og eg havi brúkt manga summarfrítíð, páskafrítíð og nógvar dagar eftir skúlatíð, til at arbeiða á bryggjarínum.

Jan Christiansen sigur, at hann persónliga hevur altíð hildið seg til Restorffs øl, og vónar hann, at ølið fer at vera so væl umtókt, at føroyingar sleppa frá, at innflyta danskt øl. Eisini sigur hann, at tað kann vera gott við einum eigaraskifti sum hesum, tí soleiðis fær bryggjaríið nýggja orku og marknaðarføring, sum ofta er góð fyri eina slíka fyritøku.

– Nú eri eg ikki nakar ølkennari, men hetta ølið stendur so heilt vist ikki aftanfyri annað øl, sigur Jan Christiansen at enda.



# Reisigildi fyri fyrsta føroyska undirsjóartunlinum

**- Gott undirstøðukervi er fortreyt fyri trivna og mentan, og at vit kunnu røka málunum, tá tað snýr seg um økis- og útjaðaramenning. Tí mugu vit eisini hugsa um at útbyggja undirstøðustøðukervið fyri landið sum heild, tað verið seg vegir, brýr, tunnlar, skip og kervið á samskiftisøkinum segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum, tá hann í sambandi við reisigildið fyri fyrsta føroyska undirsjóartunlinum helt røðu í Miðvági**

VÁGATUNNILIN
*Jan Müller*



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður var millum mongu gestirnar til reisigildið fyri Vágatunlinum*
*Mynd Jens K Vang.*

Saman við løgmanni var landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Bjarni Djurholm fyrsti at ganga ígjøgnum opið í Vágatunlinum, tá skotið varð ígjøgnum seinasta hósdag. Eftir hetta var stór samkoma í tunlinum, har m.a. Bjarni Djurholm og Jørgen Niclasen, landsstýrismenn fagnaðu hendingini og komandi fasta sambandinum millum Vágaoynna og meginøkið.

Undir samkomuni, sum varð í bygdahúsinum í Miðvági, seinni á kvøldið vóru mong fagnarorð borin fram og millum røðararnar var eisini landsstýrismaðurin í samferðslumálum.

Hann vísti á, at síðani føroyingurin setti búgv í Føroyum, hava náttúruskaptu fortreytirnar ella viðurskiftini gjørt, at møguleikarnir at samstarva við landsmenn – ætt, vinir og kenningar, í øldir í stóran mun hava verið treytaðir av streymviðurskiftum og veðurvánum.

- Hóast tøknin og framburðurin so við og við hava betrað um ferðslumøguleikarnar oyggjarnar millum, har dentur hevur verið lagdur á at betra um skipa- og havnaviðurskiftini, so hava avmarkingarnar framvegis verið eyðsýndar.

Farnu árini er tað eisini vorðið alt meira sjónligt, at menningin av samfelagnum verður tarnað, verður ikki betrað munandi um flutningskapasitetin tá ræður um samferðslu oyggjanna millum vísti landsstýrismaðurin á og helt fram:

- Samlaði politiski myndugleikin ásannar avbjóðingarnar. Tí hevur eisini verið full semja um stigini, sum tikin eru farnu árini í útbyggingini av samferðslukervinum, bæði á sjógvi og á landi.

Úr rúgvuni kunnu nevnast Sandoyarfarleiðin, Suðuroyarfarleiðin og undirsjóarsambondini.



*Bjarni Djurholm segði í røðu síni í bygdahúsinum í Miðvági, at tað gongur ikki so long tíð til farið verður undir Norðoyatunnilin*
*Mynd Jens K Vang*

## Á skránni í mansaldur

Bjarni Djurholm vísti á, at fasta sambandið um Vestmannasund hevur verið á skrá seinasta mansaldurin. Undangongumenninir vóru tingmenninir Vilhelm Nielsen og Haldor Hansen sáli. Hóast talan tá var um brúgvasamband, so var hetta spírin til ferðsluleiðina, sum er veruleiki í dag. Í 1988-89 skjøtil settur á gerð av undirsjóartunnli undir Vestmannasundi. Arbeiðið steðgaði orsakað av ringu tíðunum, sum tá tóku seg upp.

Bjarni Djurholm segði víðari, at so hvørt, sum komið varð út í seinnu helvt av nítiárini, og kreppan sjónliga var um at hæsa av, tók tosið seg alt meira upp um at fara í gongd við arbeiðið aftur. Í seinasta fíggjarárinum í farna valskeiði (1994/98) var so avgerð tikin um at byrja aftur og vóru fyrstu mio. settar av til verkætlanina.

Á eykajáttanarlógini oktober 1998 samtykti Løgtingið so, at Føroya Landsstýri fekk heimild at stovna og seta pening í partafelag, hvørs endamál skuldi vera at stovna fast samband um Vestmannasund.

Leiðslan í felagnum arbeiddi víðari við ætlanunum, sum Landsverkfrøðingurin í 1988-89 arbeiddi við, og víkur núverandi ætlan ikki stórvegis frá henni, hvat viðvíkur hvar vegir og tunnil eru løgd.

Eisini dagførdi og útbygdi Vinnumálastýrið tær kost-nyttu kanningar, sum í sínari tíð vórðu gjørdar, og vístu tær, at tað gav samfelagsligt avkast at gera hesa íløguna.

## Nýggjur leistur

Leisturin, sum brúktur er at fremja ætlanina, er nýggjur í Føroyum, og elvdi hann til ávíst politiskt orðaskifti, men hevur tað víst seg, at hann hevur verið væl brúkiligur.

Tað hevur eydnast at finna eina dugnaliga leiðslu, sum hevur ábyrgd av ætlanini, men harumframt er tað eydnast at fáa í lag gott samstarv millum partafelagið og tekniska stovn landsins, Landsverkfrøðingsstovnin, og hevur hetta samtarv verið ein av fortreytunum fyri góðu gongdini segði landsstýrismaðurin.

Eisini hevur leiðslan fyri felagnum havt eina hepna hond at finna sær entreprenørar og ráðgevarar á ymsu økjunum. Í heila tikið hevur tað gingist so væl higartil, at samt Løgting ikki ivaðist at samtykkja at stovna nýtt partafelag, sum fær til uppgávu at gera tunnil undir Leirvíksfirði. Tvs. at halda fram eftir sama leisti.

Fíggingin av verkætlanini er umframt tær 160 mió. kr, ið landið setir í felagið, upptøka av láni frá fíggingarstovnum.

Framhald á síðu 21